

*Henda myndin er tikin, tá Dinnafía og Jógvan Sofus høvdu diamantbrúdleyp í 1997. Standandi f.v. eru børnini: Jónhild, Gerda, Katrin, Kristina og Sjúrður*



*Her sæst Jákup Pauli Biskopstø saman við systrini Apoloniu. Tey mistu bæði blaðungar synir við Acorn, umframt at Jákup Pauli brendist illa*



*Frida, dóttir Jákup Paula Biskopstø, kendur frá okkara frásøgn um Acorn, saman við manninum Tummasi Debes*

sluppu við skipi, fóru í staðin at rógva út, og hetta lá jú eisini væl fyri við Gjógv.

Tað var so nógvur fiskur at fáa, og tað var eisini so serliga gott veður um summarið.

Undir krígnum vóru so nógvir bátar, sum róðu út, at tað gjørdist ov trongligt á vanligu leiðunum. So frætta vit, at bátarnir eru farnir at fiska eystur á havið. Tað var so óhøgligt. Vit fingu at vita, hvar teir royndu, og tað var Brúgvin og Barið, sum miðið kallaðist. Miðhavið gav frá sær, tí bleiv einki at fáa. Men so minnist eg tað, at eingin visti, hvar hvør annar fór.

Vit ætlaðu so at fara eystur á hav við snøri. Eg átti eina byrsu, hon klikti við øðrum løbinum. So fór eg til Sivar Martin, tann góði jarnsmiður hann var, at fáa sett eina aðra fjøður í. Vit fara so eystur á hav. Eg síggi ein bát, og teir draga, sum teir vilja, og so sigldu vit eitt sindur burtur frá honum. Tað var logn, og tað var ikki ein tann einasti fuglur at síggja, men vit høvdu fingið nakrar sildir. Eg hevði tikið so mikið sum eitt karðatróður, t.v.s. stødd á einum karða, av spiki við mær. So fóru vit at skera smáar bitar av spiki og at kasta teir á sjógv. Og ryturnar koma á skák niður úr luftini. Pápi skjeyt so eina rytu í part, og so kastaðu vit. Vit fingu 2.000 pund, og eingin kom til meira enn 1.400 pund á hesi leið eftir hetta. So vit vóru stak heldigir henda dagin. Hetta var mariumessudag, 25. mars í 1943.

## Piddi í Fuglafirði fer at keypa fisk

Ein morgun fóru bátarnir til útróðrar og tað var so óalmindiliga gott veður. Tað sást væl inni á landi. Summir fóru eitt sindur longur enn summir. Á ytra endanum á línuni var ikki ein tann einasta hýsa. Vit fingu ikki ein fisk, men á innara endanum var á hvørjum húki. So koma vit aftur at landi. Teir flestu høvdu einki fingið, men Rættarbáturin ella Norðingurin, sum verpápi mín og beiggi hansara Óli Andrias á Rætt áttu, høvdu fingið nógva hýsu. Aftaná bleiv ikki so gott veður, og spurningurin var, um vit skuldu fara ein dag afturat. Tað gjørdist eisini sjaskveður morgunin eftir, og eingin bátur fór til útróðrar. Vit stóðu í handlinum hjá Sofus Debes og tosaðu um, hvat vit skuldu gera, tí tað vísti seg at vera nógv hýsa til nú. Óli Andreas var av bestu skilamonnum bæði á sjógvi og landi og hevði verið skipari í nógv ár, og hann hevði ført skip hjá Pidda í Fuglafirði. So spurdu vit hann, um hann ikki vildi tosa til Fuglafjarðar, um teir vildu keypa fisk her norðuri. Tað var ja hjá Pidda, áðrenn hálvtalað var orðið. So var eitt tríbein ella gálgi settur í gjónna, og vektir settar upp, tað vóru tær stóru trævektirnar. Og hvønn tann einasta dag varð fiskurin vigaður í Gjónni, og so vóru vit leysir við hann. Motorbátur kom úr Fuglafirði eftir fiskinum og útróðrarmenninir fingu pengarnar í hondina. Tað var vist Dánjal Klein, sum tá var formaður í Føroya Fiskimannafelag, sum hevði við vektina at gera. Í Fuglafirði varð fiskurin umskipaður og sendur til Bretlands.

Vit vóru síðan regluliga avroknaðir hvørja ella aðru hvørja viku.

## Ferjá

Vit fingu okkum eftirnavnið Ferjá, og hetta navn hevur sína søgu. Ferjá er á í Gjáarlíð. Hon rennur oman í Funningsfjørð. Sagt verður, at tað var her, at víkingurin Grímur Kamban tók vatn, og teir góvu ánni navnið Ferjá, sum er elsta áarnavn í Føroyum. Grímur Kamban var fyrsti norðbúgvi, ið setti sínar føtur á land í Føroyum og var hetta sum skilst í Funningi.

## Vegasamband

Gjógv fekk í 1959 vegasamband til Eiðis. Inntil tá varð nógv gingið millum Gjógv og Eiði, sum t.d. við posti. Vegasamband til Funnings kom ikki fyrr í 1961. Nógv ár seinni kom vegur frá Funningi í Funningsbotn, og harvið við restina av Eysturoynni. Júst hetta sambandið kom eisini at hava stóran týdning fyri bygdina, tí tað er so ofta á vetri, at tað ikki er koyrandi um Eiðisskarð.

## Lagnan hjá Oliviu Angeliu, mammu Dánjal Klein

Aðrastaðni í hesi Miðviku prenta vit greinina Livsskæbner, sum presturin Absalon Joensen skrivaði í 1920 um mammu Dánjal Klein, sum æt Olivia Angelia.

Henda greinin talar fyri seg sjálva, um hvussu hart tað kundi vera hjá fólki. Vit minnast væl Oliviu, sum doyði í 1927 og minnast eisini, at hon bert hevði eitt eygað, og er greitt frá orsøkini fyri hesum í umrøddu grein. Jógvan Sofus minnist, at hann gekk at lesa, sum tað varð kallað, uppi í Geil hjá henni. Tey vóru eini fimm seks børn í senn.

Tað var soleiðis, at børn fóru seks ára gomul út í onnur hús at ganga at lesa, so tey kendu bókstavirnar og dugdu eitt sindur at lesa, áðrenn tey fóru í skúla. Hetta hevur verið eitt slag av tí, sum vit í dag kalla forskúla.

Henda lesing gekk fyri seg í roykstovuni, har tað frammanundan stóð ein stórur vevur, sum hon uttan iva hevur brúkt til at vinna til lívsins uppihald. Her var heldur trongligt inni, men tað var hugnaligt og væl gekk at læra.

Tá ið hon fór til gravar, fór lærarin Jóhan Kallsoy við skúlabørnunum niðan í Geil at syngja fyri líkinum, og man hetta hava verið ein viðurkenning og tøkk fyri tað, sum hon hevði lært børnini.

## Tøkk til Dinnufíu og Jógvan Sofus

Her endar røðin við frásøgnum hjá hjúnunum báðum, sum hava upplivað so nógv, og sum vita so nógv. Røðin gjørdist nógv longri enn roknað var við frá byrjan. Ofta er tað soleiðis, at ein søga førir eina aðra við sær. Verður hon ikki tikin við beinanvegin, er vandi fyri, at hon fer í gloymskuna.

Vit vita, at henda røðin hevur verið nógv lisin, og at hon hevur verið roknað sum eitt virðismikið íkast til søguna hjá "vanligum" fólki í Føroyum.

Tann mest kensluborni parturin hevur verið frásøgnin um Acorn, og her hava vit eisini upplivað, at tey avvarðandi at hesi vanlukku hava verið sera fegin um tað, sum her fyrstu ferð er fest á blað. Hetta er eitt gott dømi um, at tað ræður um at fáa fest slíkar hendingar á blað, áðrenn tað er ov seint. Hetta er veruliga ein partur av okkara lagnusøgu og samleika.

Sjúrður, sonur Dinnufíu og Jógvan Sofus, hevur eisini gjørt eitt stórt arbeiði at fáa hesar frásagnir so rættar og fullfíggjaðar sum gjørligt.

Fyri meg sjálvan hevur arbeiðið við hesi røð verið ein uppliving og ein stuttleiki. At kunna gera nakað, sum fólk virðismeta og takka fyri, er – næstan – nóg stór løn í sær sjálvum.

Men Dinnafía og Jógvan Sofus: Takk fyri, at tit vildu greiða okkum øllum frá tykkara áhugaverda lívi!